# Pleygaður og passaður í allar endar og kantar

**Jógvan Norðbúð mátti bíða í meiri enn eitt ár eftir at sleppa til viðgerð á Landssjúkrahúsinum. Tí endaði hann á Suðuroyar Sjúkrahúsi og14 dagar aftaná var hann frískur aftur**

HEILSURØKT
*Áki Bertholdsen*

– At liggja á Suðuroyar Sjúkrahúsi er sum at vera nøkrum hotelli.

Tað er niðurstøðan hjá Jógvani Norðbúð, nú hann er útskrivaður aftur og er farin til arbeiðis eftir at hav ligið á Suðuroyar Sjúkrahúsi í nakrar dagar.

Hann er ein av teimum heilt fáu norðoyingunum, sum hava ligið á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Men tað var ikki upprunaliga ætlanin, at Jógvan Norðbúð skuldi avgreiða sína sjúkralegu í Suðuroynni.

– Eg var hjá lækna, har tað varð staðfest, at eg hevði brokk, greiðir hann frá.

Av tí sama skuldi hann leggjast undir skurð og læknin gjørdi sum vant - og skrivaði hann upp til Landssjúkrahúsið.

– Men tá ið eg so spurdi, hvussu long bíðitíðin var, svaraði hann, at tað fór at ganga eitt til hálvtannað ár til eg slapp framat.

– Tað helt eg ikki, at eg kundi liva við og spurdi um tað veruliga var so, at tað ikki kundi gerast skjótari.

Tá spurdi læknin um hann hevði tikið av, fekk eg í boðið at fara á Suðuroyar Sjúkrahús.

– Tað var eitt tilboð, sum eg hjartans fegin tók av, tí eg hevði als ongar trupulleikar av at fara til Suðuroyar at verða lagdur undir skurð. Tað einasta, sum ráddi um hjá mær, var at fáa tað frá hondini sum skjótast.

Jógvan Norðbúð sigur, at tað gingu ikki meiri enn 10 dagar, so fekk hann bræv frá Suðuroyar Sjúkrahúsi um at møta vikuna eftir.

Sostatt varð hann innlagdur týsdagin í vikuni eftir, varð lagdur undir skurð mikudagin, varð útskrivaður fríggjadagin og fór aftur til arbeiðis mánamorgunin.

## Sum ein stór familja

Jógvan Norðbúð er ógvuliga fegin um at hann tók av tilboðnum at fara á Suðuroyar Sjúkrahúsi, tí nú fekk hann sjúkraleguna avgreidda upp á 14 dagar, heldur enn at hann skuldi ganga í Havn og bíða í upp til hálvtannað ár fyri at sleppa á Landssjúkrahúsið.

– Og eg má siga, at eg hevði ikki fingið betri móttøku á nøkrum hotelli, sum eg fekk á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Tað var sum at koma í eina stóra familju og eg varð pleygaður og passaður so væl sum tað yvirhøvur kann lata seg gera.

Hann heldur ikki, at tað finnast betri umstøður nakrastaðni enn tær, sum eru á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

– Alt er nýtt og snotiligt og vakurt og vælhildið, so umstøðurnar eru fullkomnar.

Hann heldur eisini, at starvsfólkið var ómetaliga fryntligt og fitt og hartil dugnaligt.

– Hjá mær var hetta av sonnum ein sólskinssøga, sigur havnarmaðurin.

Hann sigur tí, at er talan um eina vanliga viðgerð av onkrum slagi vil hann upp á tað heitasta mæla fólki til at lata seg leggja inn á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

– Viðferðin sjúklingar fáa har er fyrsta floks, bæði so og so og er talan um eina vanliga skurðviðgerð, í er tað als ongin orsøk til at bíða eftir at sleppa framat í Havn, har tað er ovurfylt frammanundan.

– Men er talan um viðgerð, sum krevur stóra servitan, er sjálvandi neyðugt at fara á Landssjúkrahúsið, tí har hava tey bæði útgerð og serlæknar, sum ikki eru á teimum smáu sjúkrahúsunum.

Jógvan Norðbúð sigur, at hann skilir ikki, hvussu tað ber til at, at tey smáu sjúkrahúsini ikki verða brúkt til fulnar, tá ið bíðilistarnir eru so langir til fleiri sjúkraviðgerðir á Landssjúkrahúsinum.

Tað er ein sannroynd, at eitt sjúkrahús, sum Suðuroyar Sjúkrahús, kann viðgera nógv fleiri fólk, enn tey gera í løtuni, verður tað útnyttað til fulnar.

– Tað er heilt ótrúligt og líkist ongum at ganga eftir teirri snotiligu gongini á Suðuroyar sjúkrahúsi og kaga inn á stovur og síggja tómar sengur, samstundis sum fólk norðanfjørðs ganga og pínast og bíða í mánaðir og ár eftir at sleppa framat á Landssjúkrahúsinum, leggur hann afturat.



*– Hetta var ein rættilig sólskinssøga fyri meg, tí hetta er sum at vera á nøkrum hotelli, sigur klaksvíkingurin í Havn, Jógvan Norðbúð, úr sjúkrasongini á Suðuroyar Sjúkrahúsi*




# Kunnu viðgera einar 200 sjúklingar afturat um árið

**Verða tey smáu sjúkrahúsini brúkt til fulnar, kann bíðilistin til nógv sløg av sjúkraviðgerðum minkast niður í onki**

BÍÐILISTAR
*Áki Bertholdsen*

At tað í nógvum førum ber til at sleppa nógv skjótari til viðgerð á Suðuroyar Sjúkrahúsi enn á Landssjúkrahúsinum er ikki nakað nýtt.

Soleiðis hevur tað verið leingi!

Kortini eru tað ógvuliga sjáldsamt, at sjúklingar norðanfjørðs verða lagdir inn á Suðuroyar Sjúkrahús til viðgerðar , heldur enn at bíða í mánaðir og ár eftir at sleppa framat á Landssjúkrahúsinum.

Og Jógvan Norðbúð í Havn, sum vit hava samrøðu við í greinini omanfyri, er ein av heilt fáum norðoyingum, sum hava tikið av tilboðnum um at verða innlagdur á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Úrslitið av tí var, at sjúkralega hansara varð avgreidd upp á 14 dagar, ístaðin fyri at hann skuldi ganga sjúkur í upp til hálvtannað ár, tí so leingi hevði tað tikið hjá honum at sloppið framat á Landssjúkrahúsinum.

Á Suðuroyar Sjúkrahúsið hava tey 1200-1300 sjúklingar um árið. Einar 400-500 skurðviðgerðir verða gjørdar á sjúkrahúsinum um árið.

Tá ið limir í fíggjarnevnd løgtingsins vitjaðu á Suðuroyar Sjúkrahúsi herfyri, fingu teir at vita, at tað ber væl til at skurðviðgera eina 200 sjúklingar afturat á Suðuroyar Sjúkrahúsi um árið.

Ongin veit, hvussu tað ber til, at sjúklingar norðanfjørð heldur bíða í mánaðir eftir at sleppa framat á Landssjúkrahúsinum, samstundis sum tað ikki meiri enn kemur fyri, at teir verða vístir til Suðuroyar Sjúkrahús.

Men onkusvegna vísir tað seg at vera trupult at fáa læknar norðanfjørðs at senda sjúklingar suður hendavegin, hóast har standa sengur tómar.

Tá fingu politikararnir eisini at vita, at Landssjúkrahúsið sendir ikki ein tann einasta sjúkling til Suðuroyar, hóast bíðilistarnir har eru langir og tað ber til at sleppa framat í Suðuroy upp á nakrar fáar dagar.

Tær stóru skurðviðgerðirnar, sum krevja nógva servitan, ber sjálvsagt ikki til at gera á Suðuroyar sjúkrahúsi.

Men tá ið talan er um smærri skurðviðgerðirnar av ymsum slagi, er tað í nógvum førum at tað ber til at sleppa framat á Suðuroyar Sjúkrahúsi nógv skjótari enn á Landssjúkrahúsinum fyri sostatt at stytta sjúkraleguna niður í ein brotpart av tí, hon annars hevði verið.

Leiðslan á Suðuroyar Sjúkrahúsið heldur ikki, at tey trý sjúkrahúsini í heilsuverkinum eru samskipað nóg væl og verða tey samskipað, kunnu bílilistarnir til ávísar viðgerðir lættliga fáast munandi niður.

Tó leggja tey á Suðuroyar Sjúkrahúsi dent á, at tey eru sera væl nøgd við tað dagliga samstarvið við Landssjúkrahúsið.



# Fiskimálaráðið ger egið mistak lógligt

**Ræðisavmarkingin á útróðrarbátinum Nakki, sum fer úr flotanum fyri Jógvan S, er strikað av Fiskimálaráðnum. Tað var eitt mistak, at báturin, sum síðan 1991 bert hevur havt loyvi at fiska við snellu, kortini fiskaði við línu í eini átta ár, sigur landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum. Báturin fær tí fult fiskiloyvi aftur**

FISKIVINNUUMSITING
*Edvard Joensen*



*Fiskimálastýrið gloymdi, tá lógin um vinnuliga fiskiskap kom í gildi í 1994, at Glottin var ræðisavmarkaður til snelluveiðu. Báturin fekk tí í sjey ár vanlgt fiskiloyvi við rætti til at rógva út við línu undir Føroyum*

Fiskimálaráðið hevur tann 21. februar í ár boðað eigarunum av útróðrarbátinum Nakki frá, at ræðisavmarkingin frá 21. mars 1991, sum álegði bátinum bert at fiska við snellu, er avtikin. Báturin hevur í hesum tíðarskeiði, hann var ræðisavmarkaður til snelluveiðu, verið skrásettur hjá Fiskiveiðieftirlitinum við 80 tillutaðum línudøgum á innaru landleiðini og 30 døgum á Bankanum. Talan er um eitt umsitingarligt mistak, sum nú er gjørt lógligt, sigur landsstýrismaðurin.

Í skjølum, Sosialurin hevur fingið innlit í, sæst, at Fiskimálaráðið tann 21. februar 2003 hevur boðað Sp/f Nakki í Klaksvík frá, at Fiskimálaráðið hevur gjørt av at strika ræðisavmarkingina, sum bert gevur bátinum, sum tá æt Glottin, lovyi at royna við snellu, eins og hon slær fast, at báturin:

.........»ikki má seljast uttan so, at keyparin góðkennir hesa avmarking í nýtsluni av farinum. Hendan ræðisavmarking er eisini galdandi, um fiskifarið tekur lut í fiskiveiðu av fiskakvotu hjá Føroyum uttan fyri føroyskt sjóøki«.

So er kvirt um Glottan, sum kortini hevur fingið línudagar tillutaðar, hóast hann ikki má fiska við línum sambært somu ræðisavmarking.

Tann 29. apríl 2002 hómast Glottin aftur, tá biðið verður um, at hann - nú undir navninum Barið - saman við Skørini sleppur at lata síni fiskiloyvi til Ågot 1, sum seinni fær navnið Jógvan S.

Við hesi strikan av ræðisavmarkingini flytir Fiskimálaráðið í veruleikanum eitt fiski- og veiðiloyvi millum tveir bólkar, og leggur lunnar undir, at ein útróðrarbátur undir 40 tons í veruleikanum letur loyvi síni til eitt línuskip, sum er umleið 330 tons til støddar. Tó saman við einum øðrum útróðrarbáti undir 80 tons.

Sama dag, sum Sosialurin tekur málið upp og biður um skjalainnlit, váttar verandi eigari av Glottanum, sum nú eitur Barið, eina nýggja ræðisamarking, sum sigur, at báturin ikki má verða nýttur aftur til fiskiskap undir føroyskum flaggi. Báturin má heldur ikki seljast, uttan ein møguligur keypari eisini gongur undir somu treyt, stendur í váttanini.

Hendan gongdin við, at báturin fram til 1. september 2002 hevur fingið línudagar tillutaðar, háost hann bara hevur havt loyvi at fiska við snellu, og so knappliga tá fær snelludagar og ongan línudag, fyri síðan aftir at fáa ræðisavmarkingina heilt strikaða á vári 2003, kemst av einum umsitingarligum mistakið í Fiskimálastýrinum í 1994, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum.

Hann greiðir frá, at tá lógin um vinnuliga fiskiskap kom í gildi, varð ikki ansað eftir, tá fiskiloyvið til Glottan varð skrivað út, at hann bert hevði loyvi at fiska við snellu. Hann fekk tí eitt vanligt fiskiloyvi, sum gav rætt til bæði línu- og snelluveiðu undir Føroyum.

Hetta loyvið var so endurnýggjað á hvørjum ári fram til fiskiárið 2002-2003, tá umsitingin varð varug við, at her var skeivt atborið.

Men nú bar iki til at krevja bátin ræðisavmarkaðan aftur til snelluveiðu, sigur landsstýrismaðurin. Tí løgfrøðiligar metingar bæði í Fiskimálaráðnum og frá óvildugum løgfrøðingum søgdu, at nú hevði hetta staðið so leingi uppá, at báturin hevði hevdsrætt upp á eitt vanligt fiskiloyvi.

Sostatt varð gjørt av í Fiskimálaráðnum at gera sítt egna mistak lógligt. Ræðisavmarkingin hjá Glottanum, sum nú eitur Barið, varð strikað, og báturin kann lata sítt fiskilovyi til eitt línuskip, sum verður bólkað í bólki 4B, uttan at talan kortini er um at flyta millum høvuðsbólkar.



*Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, sigur, at løgfrøðingarnir hava gjørt av, at orsakað av, at so long tí er gingin nvið mistakinum, ber ikki til at geva bátinum annað enn vanligt fiskiloyvi í frmatíðini*